NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

6. mars fingu Annik Gøthe, Norðragøta og Jonathan Farrelly, Dublin, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3300 gr.

15. mars fingu Tri Daryanti og Eyðun Øssurson Hjalt, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3830 gr.

15. mars fingu Sára Dam og Johnny Kjærbo, Kvívík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3550 gr.

16. mars fekk Nanna H. Jakobsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3250 gr.

16. mars fingu Heidi og Jógvan Kristin Olsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4025 gr.

18. mars fingu Ronnie og Kristina Háfoss, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4000 gr.

18. mars fingu Anna V. K. Gray og Sjúrður Rubeksen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3225 gr.

20. mars fekk Tove Bech, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3475 gr.

20. mars fingu Jórun og Virgar Hvidbro, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4130 gr.

75 ár
Mánadagin 27. mars fyllir Anker Mørkøre, Klaksvík, 75 ár.

80 ár
Mánadagin 27. mars fyllir Mikkjal Miðalberg, Klaksvík, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin sunnudagin 26. mars á Klaksvíkar Sjómansheimi frá kl. 15-20.

Brúdleyp
Leygardagin 25. mars kl. 14.00 verða Súsanna Funding og Rúni Juul vígd í Funnings kirkju. Brúdleypið verður fyri innbodnum í Samkomuhøllini í Hoydølum kl. 19.00.

Maria á Lakjuni

2. mai 1921 - 8. januar 2006

Eg fari at skriva nøkur fá orð um Mariu á Lakjuni. Vit vóru systkinabørn, vórðu uppkallaðar eftir somu ommu, kanska tí havi eg kent nakað serligt fyri henni.

Mia var 19 ár eldri enn eg, so hon kundi verið mamma mín fyri aldur. Hon giftist við Jákup Oluf á Lakjuni í Fuglafirði, og saman fingu tey seks synir. Hon plagdi skemtandi at siga við meg: Tú hevur ikki fingið meg aftur enn! Tá sipaði hon til, at vit eiga fimm.

Onkur fortaldi mær, at hon hevði verið til staðar, har tosað varð um, at ofta var ikki so væl ímillum sonarkonur og vermøður. Tá skuldi hon siga: Jú tað er vist, eg eri góð við sonarkonurnar, tað hevði ikki verið gott, um eg var innibrend við seks synum! So hon kundi vera skemtingarsom eisini.

Jákup Oluf var sjómaður, so tað fall í hennara lut, at uppala synirnar og standa fyri heiminum einsamøll ein stóran part av árinum, hetta eydnaðist eisini væl hjá henni, sum tann megnarkvinna hon var.

Vit komu nógv til Fuglafjarðar í uppvøkstrinum, og tað gleddu vit okkum altíð til. Eg havi mangan hugsa um, hvussu stórur blíðskapurin var, bæði heimi hjá Rikku fastur og norðuri hjá Miu. Tað tyktist ikki at gera mun, hvussu nógv

fólk kom á gátt – her hugsi eg serliga um møtini, sum plagdu at vera um vetrarnar – vit vóru ofta nógv ungfólk inni hjá Miu, og fingu vit øll ein góðan drekkamunn, tað eru løtur sum ongantíð verða gloymdar, tann blíðskapur og tað hjartalag sum har varð víst.

Mia var eitt so gávað fólk, onkuntíð tosaðu vit í telefon saman, kanska um okkurt ávíst evni, altíð fekk eg okkurt gott burturúr, aftaná eina slíka samrøðu.

Eg minnist einaferð, at eg og Arnleyg Jacobsen tosaðu saman, og hon nevndi okkurt, sum Mia hevði sagt. Eg segði, at Mia var so klók. »Klók«segði Arnleyg »hon er ikki bara klók, hon er so vís!«

Mia var ófør við penninum, ikki smæddist hon at siga sína hugsan, og til reiðar at verja tað, sum hon helt vera rætt, hetta dugdi hon væl á ein sera høviskan hátt, hon smæddist heldur ikki við at siga nøkur orð í samkomum, bæði til, álvara og gaman.

Tíðin fer so skjótt, og vit varnast næstan ikki, at tey sum vit hava kent alt lívið eru vorðin gomul, og tíðin er komin at leggja frá sær. Vit hava heldur eina kenslu av, at tey verða verandi ímillum okkum. Tí hvøkka vit við, tá ið vit hoyra, at nú eru tey farin. Mia skrivaði í eini grein til mammu sína, tá hon fylti 95 ár: So leingi eg kann siga mamma, so føli eg meg ikki so heilt gamla, men vit vita, at tíðin er ikki so long eftirt her niðri. Skjótt skulu vit flyta og møta okkara kæru, sum undan okkum fóru, í teim ævigu bústøðum.

Nú er Mia farin og hevur møtt teimum aftur, sum hon saknaði her. Harrin signi tykkum øll, sum eftir sita.

Friður verið vð minninum um navnu mína, Mariu á Lakjuni.

Uppi har mítt eyga skoðar
Hann, sum her meg elskaði,
Hann, sum sorg og pínur mínar,
har í eymum kærleiki.
Har hin loysti skarin syngur
um, hvør stór hans náði var,
ævigt ljóðar gleðisongur
í tí fagra Sion har!

Maria

Tøkk

Øllum tykkum, sum gleddu meg á 80-ára føðingardegnum 27. februar 2006, takki eg hjartaliga.

Tøkk til tykkum, sum komu í Filadelfia, og gjørdu dagin minnisríkan fyri meg. Ein serlig tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til.

Eisini takki eg tykkum, sum ringdu og sendu fjarrit.

Heilsan
Schwarts Jacobsen
Norðragøta

Neistin 75 ár:

Her varð felagið stovnað

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við at hondbóltsfelagið Neistin fylti 75 ár í vikuni, stóð í tíðindaskrivi

"Tað var leygardagin hin 21. mars í 1931, at gentur og dreingir komu saman í einum húsum í Magnus Heinasonargøtu í Havn at stovna hondbóltsfelagið Neistan".

Í føðingardagsritinum, sum kom út tá felagið fylti 50 ár, stendur at 21. mars 1931 komu fleiri ung saman í húsunum hjá Jakku hjá Pedda í Magnus Heinasonargøtu.

Tað eru hesi húsini á myndini í Magnus Heinasonargøtu 14.

Millum teir sum vóru við til at stovna Neistan vóru: Andreas Mouritsen, Helge Michelsen, Edel Djurhuus, Borghild Evensen, Anna á Lag, Sanna á Lag og fleiri.

Hondbóltsfelagið Neistin varð stovnað 21. mars 1931 í hesum húsunum í Magnus Heinasonargøtu

Mynd: Magnus Gunnarsson